# Prýði hevur bleytu pakkarnar til jóla



**Tað eru 19 ár síðani, at tvær dagrøktarmammur fóru at reka handilin Prýði á flogvøllinum í Vágum. Handilin er í dag kendur av flestu føroyingum, eins og av útlendskum ferðandi, og heilsanir koma úr øllum ættum**

Gávuhandilin Prýði, ið heldur til í Vága Floghavn, hevur í næstum 19 ár á baki. Tað vóru tvær dagrøktarmammurnar, ið fóru undir at reka Gávuhandilin Prýði. Tær hildu hetta vera spennandi og eina avbjóðing, og tær hava samstarvað væl.

Nógv er hent síðani, og skal ein trupulleiki nevnast, so er tað, at hølini saktans kundu verið størri.

Og starvsfólkini í gávuhandlinum á flogvøllinum koma í samband við nógv fólk millum ár og dag, og stuttligt er at fáa heilsanir úr øllum heimsins heraðshornum.

## Nýtt til jóla

Í Prýðinum vænta tey, at nógvir bleytir pakkar eru undir jólatrøunum í ár.

Nógvar troyggjur eru komnar í handilin til jóla, og sølan hevur verið stak góð. Serliga fegnast sølufólk og kundar um, at væl umtóktu moyrreyðu troyggjurnar eru at fáa aftur.

Annars eru tað turrukløð, vøttir og annað, ið nógv verður selt av, og so gávulutir frá Rosendahl, Georg Jensen og tílíkt. Pyði hevur eittnú eisini souvinir, leikur og fløgur.

## Meira opin

Broytingar eru gjørdar í handlinum, og kennist hann - og er hann - nú meira opin, enn áður, og hann kennist rúmligari. Nýtt innbúgv er eisini í handlinum.

Um summarið vitja nógvir útlendingar Prýði, men annars eru tað føroyingar, ið mest vitja innar.

Og tað, at mjørkin liggur av og á, kann eisini geva stuttligar og hugnaligar løtur, siga starvsfólkini í handlinum. Tey eru 4 starvsfólk, ið eru knýtt at handlinum.

Gávubúðin Prýði er opin hvønn dag í vikuni frá klokkan 7 á morgni, til klokkan 17:30.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

















